# Uppiborið

*Anni Helena Lamhauge*

“Halló, halló, hon sjálv!” rópti maðurin, ímeðan hann knipsaði við fingrunum fyri at fáa tænaran yvir til borðið. “Hvat er hetta fyri nakað?” segði hann harðmæltur, “hvussu kanst tú við góðari samvitsku geva mær ein drykk, har meir enn helvtin er ísterningar?”.

Har vóru nógv fólk í matstovuni, og næstan øll vendu sær á at hyggja eftir tí, sum gekk fyri seg. Unga gentan, sum tænti við borðið, sá illa við út, men royndi at svara, tó breyt maðurin hana av: “Er arbeiðið hjá tær veruliga so trupult, at tú ikki klárar at gera ein vanligan drykk?” segði hann, meðan froðan stóð um munin. Gentan var týðiliga ávirkað av ábreiðsluni og svaraði spøk, “eg skal gera tær ein nýggjan kokkteyl” og skundaði sær frá borðinum. Maðurin sat eftir, ilsligur, men at síggja til væl nøgdur við, at hann fór at fáa sín drykk ókeypis.

Eg gekk yvir til borðið hjá honum, og hann hugdi upp ímóti mær. Við einum tivandi andadrátti segði hann: “Hvat nú?.” Eg sá eina æðr banka í tinninginum á honum. “Kann eg seta meg við borðið hjá tær eina løtu?”, segði eg róliga og setti meg við borðið.

*Hann luktaði av tubbaki og eini tjúkkari, ágangandi perfumu.*

Hann lenaði seg afturá, men hevði framvegis sama arga andlitsbrá. “Eg skilji bara ikki, hvussu mann bara kann klutra í nøkrum so einføldum,” mutlaði hann fyri seg sjálvan. Eg nikkaði spakuliga og royndi at smíla, men eg svaraði honum ikki aftur.

Tá gentan kom aftur við nýggja drykkinum, segði hann tómliga: “Um ikki annað, so verður drykkurin ókeypis.” Hann fekk sær ein smakk og mutlaði: “Men tað burdi hann eisini verið.” “Hvar arbeiðir tú?”, spurdi eg mest fyri at broyta evni. “Tað er sjáldan, at mann møtir einum manni, sum so týðiliga megnar at vísa, hvat hann vil hava.”

Hetta fekk allan hansara atburð at broytast, og hann skeyt bróstið fram. “Eg eri deildarleiðari og arbeiði við ráðgeving. Vit handfara stórar verkætlanir. Hetta er ikki nakað smávegis, skilur tú. Vit arbeiða við stórum nøvnum, stórum kundum, og eg eri sum so tann, sum fær alt at ganga upp í eina hægri eind. Fólk koma til mín, tá ið tey hava brúk fyri at fáa tingini avgreidd.” Hann fekk sær ein sopa av drykkinum og smáflenti erpin  og helt áfram: “Tað er nógv ábyrgd, og ikki ein og hvør hevði klárað tað. Tað krevur hart arbeiði, ein vissan... *intelligens.* Mann skal tola nógv av og ikki vera líka erkvisin, sum nógv mannfólk eru í dag.”

Uttan at steðga á, tosaði hann út í eitt um, hvussu ómetaliga krevjandi gerandisdag hann hevði, eygsjónliga væl nøgdur um at sleppa at tosa um seg sjálvan.

“Hevur tú damu ella konu?” spurdi eg, tá ið hann endiliga gavst at tosa fyri at slikka sukurkantin av glasinum.

Hann flenti og svaraði: “Tss, kvinnur í dag? Eg skal siga tær, tær eru als ikki, sum tær vóru fyrr. Tær hugsa bara um at stýra øllum og skulu altíð hava sítt egna. Eg havi sæð alt ov nógvar kvinnur, sum vilja hava alt – pengar, sjálvræði, men mann skal eisini bera tær sum drotningar. Tað er ein heilt óhoyrd blanding.”

Hann rætti ryggin upp, sum um hann fór at undirvísa í lívsins sannleika og lenaði seg inn á borðið.

*Lukturin av tubbaki og hansara tjúkku, ágangandi  perfumu rakti meg aftur.*

"Tey snakka um, at konur vilja vera stjórar og leiðarar. Men biologiskt sæð hava kvinnur ein minni heila og eru als ikki líka klókar, sum menn eru. Eg skal lova tær, at eingin kvinna hevði kunnað havt mítt arbeiði. "

"Ikki tað," helt hann fram, "eg skori *nógv*. Eg havi havt nógvar damur. Eg havi bara ikki møtt einari kvinnu, sum uppfyllir øll krøvini, sum eg krevji í mínari damu."

Hann flenti eitt sindur fyri seg sjálvan, errin av síni einastandandi áskoðan.

Vit sótu og prátaðu eina løtu afturat. Hví eg var verandi, er mær óvist.

So spurdi hann brádliga: "Hevur tú hug at koma heim við mær?"

Eg læt eitt lítið tagnarsvar hanga í luftini, áðrenn eg segði: "Tú, eg haldi ikki –"

Men áðrenn eg var liðug at tosa, varð eg avbrotin. "Ja, sjálvandi, okey, eg spurdi bara... Tú hevur fullkomiliga oyðilagt mítt kvøld," segði hann og flenti tómliga, "og tú ert ikki nakað pen alíkavæl."

Øll í matstovuni tagnaðu og vendu sær ímóti borðinum hjá okkum. Á sama hátt sum tá hann rópti eftir ungu tænaragentuni.

Eg hugsaði eina løtu.

*Luftin tjúkk við tubbaki og hansara ágangandi perfumu.*

Og áðrenn eg varnaðist tað, hoyrdi eg meg sjálva siga; "Veitst tú hvat, kanska skuldi tú komið heim við mær."

Vit fóru úr matstovuni og gingu ímóti íbúðini hjá mær. Hann mundi dottið fleiri ferðir, men helt áfram við at tosa. "Eg leggi altso einki í, hvat nakar heldur. Eg havi uppiborið at siga, hvat mær dámar, og at fáa tað, eg vil. Hevði eg ikki rópt eftir tænaranum, hevði eg ikki fingið tað, sum eg hevði krav uppá."

Tað er stuttligt, hvussu nógv fólk tosa, tá tey halda seg imponera teg, hugsaði eg fyri meg sjálva.

Tá ið vit komu til íbúðina, læt eg hurðina upp og vísti honum inn í stovuna. "Set teg, so skal eg finna okkum okkurt at drekka." Eg gjørdi ein serligan drykk til hansara, sum hann tók og botnaði í einum. Hann smekkaði tóma glasið á borðið og byrjaði at ganga ímóti mær, men náddi einans tvey fet, áðrenn hann brádliga steðgaði á og tók seg um hálsin.

Hann royndi at siga okkurt, men hann fekk einki sagt. "Hvat...hvat var í hasum drykkinum?", segði hann hásmæltur. Eyguni víðkaðust av ótta, og andlitsbráið sá ørkymlað og illsint út, og máttleysur small hann um.

Við hesum síðstu orðunum legði eg mína hond á bringuna hjá honum, ímeðan hansara rørslur gjørdust tyngri, og hansara eygu blivu fylt við ótta og síðani friði.

Eg reisti meg og gekk róliga inn í køkin. Har setti eg mær fyri at gera mær okkurt at eta. Ein búff.

Eg stokti búffin í hvítleykssmøri. Smørið bráðnaði og fylti køkin við einum vælsmakkandi anga. Tá búffurin var liðugur, tók eg hann av pannuni og legði hann á ein tallerk.

Eg setti meg við køksborðið og byrjaði at eta. Knívurin gleið lættliga gjøgnum búffin,

*Rúmið fyltist við anganum av tubbaki og hvítleykssmøri.*

Innan í var kjøtið bleytt, heitt og ljósareytt.

Eg fekk mær ein bita og føldi tað ríka feittið smelta á tunguni.

Meðan eg sat í friðinum, hugsaði eg um gentuna í matstovuni. Hon var so ung og megnaði ikki at verja seg sjálva. Onkuntíð krevur tað serligar loysnir at taka sær av veruligum reyvarholum. Eg hugsaði um, hvussu hon mundi hava tað nú, og ein lítillátin, nøgd kensla fylti meg, ímeðan eg smíltist fyri meg sjálva.